# Torres vil møta Everton

Spanski áleyparin Fernando (El- Nino) Torres, kundi ikki vera við móti dønum leygardagin vegna mjadnaskaða, men hann vónar at hann kann gerast klárur til The Merseyside Derby, millum Liverpool og Everton, ið verður í vikuskiftinum. - Eg vil ikki lata møguleikan fyri at spæla Derbydyst móti Everton. Tað er mær greitt frá, hvussu stóran týdning hesin dysturin hevur, og eg vil so gjarna verða klárur til tíðina. Eg havi spælt í stórum Derby dystum fyrr. Eg spældi fyri Atletico móti Real Madrid, og eg gleði meg til at uppliva nakað líknandi í Premier League, sigur Fernando Torres fyri World Soccer News.




# ÍF leingir við tríggjar

Í gjárkvøldið varð greitt at fótbóltsliðið ÍF hevur megnað at longt sáttmálan við tríggir av sínum stuðulsleikarum. Tað hoyrist úr Fuglafirði at teir ynskja at túrurin í bestu deildini í komandi kappingarári verður drúgvari enn hann var seinas. Leikararnir, talan er um, hava verið berandi kreftir á liðnum, ið megnaði at náa uppflyting til bestu deildina í ár.Leikararnir eru: Fritleif í Lambanum (verjuleikari), Nenad Saric (miðvallaleikari/framherji) og Áki Petersen, (verjuleikari)

# Lítil áhugi fyri dystinum

**Sambært lokalum journalistum, er áhugin fyri dystinum í kvøld lítil. Møguleikin at røkka EM-endaspælinum er rokin, Shevchenko er skaddur og mótstøðuliðið ikki so áhugavert**

LANDSLIÐIÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

**Kiev, Ukraina:** Tað merkir ikki býarmyndina í stórbýnum Kiev, at tað er landsdystur í dag. Snotuligu og reinu gøturnar síggja út sum tær gera allar aðrar dagar á árinum. Lokalu sjónvarpsrásirnar gera ikki so nógv burtur úr, meðan bløðini eisini innihalda annað enn fótbólt.

Tó var eitt lítið lið av lokalum fjølmiðlafólkum til venjingina hjá landsliðnum í gjárkvøldið. Sambært hesum er áhugin fyri dystinum lítil. Hetta kemst at teirri einføldu orsøk, at liðið, sum til seinasta HM-endaspæl, var heilt stóri tjóðarstoltleikin og spældi seg í fjórðingsfinalunar, leygardagin misti møguleikan at spæla seg til EM-endaspælið í summar. Harnæst er størsta stjørnan, Andriy Shevchenko, skaddur, og tískil minkar áhugin enn meiri.

Sum ein triðji – og sæð við okkara eygum – lítið hugaligur faktorur, ið eisini ger dystin minni áhugaverdan enn aðrar, er dagsins mótstøðulið hjá Ukraina, Føroyar. Sambært journalistunum á Olimpiysky tjóðarleikvøllinum í gjárkvøldið, draga Føroyar ikki so nógvar áskoðarar sum eitt nú Italia og Frakland – surprice, surprice...

### Stórsligið stadion

Olimpiysky tjóðarleikvøllurin hevur annars pláss fyri eitt sindur av fólki. Eisini fyri 12. manni, um tað skuldi verið. Gott og væl 80.000 fólk rúmast vanliga kring stóra vøllin. Í løtuni er tó eitt sindur av byggivirksemi uttanfyri, sum ger, at tað av trygdarávum ikki sleppa meiri enn stívliga 40.000 til dystin í kvøld.

Tað verður tó á ongan hátt roknað við so nógvum áskoðarum. Lokala pressan metti, at hægst 15.000 fólk koma, men rokna ikki við meiri enn 10.000.



*Lokalir fjølmiðlar fylgdu venjingini hjá landsliðnum í gjár*
*Mynd: Rólant Waag Dam*

# Bert tríggir á sama sessi

**Í mun til fyrra dystin móti Ukraina eru heilar átta broytingar í liðnum hesaferð**

LANDSLIÐIÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

**Kiev, Ukraina:** Pláss fyri pláss er talan um átta broytingar, ið Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari, er noyddur at gera í mun til tað liðið, hann sendi á vøllin á Svangasskarði tann 24. mars í ár.

Málverjin verður hin sami og Rógvi Jacobsen verður áleypari. Tað vil siga, at aftasti og fremsti maðurin vera teir somu, samstundis sum Mikkjal Thomassen byrjar í mitt á miðvøllinum, eins og hann gjørdi seinast liðini møttust.

Á øllum hinum plássunum eru broytingar.

### Verjan skift út

Øll er verjan er útskift. 24. mars vóru tað Óli Johannesen og Fróði Benjaminsen, sum vóru miðverjar, meðan Atli Danielsen var í høgra og Marni Djurhuus vinstra borði. Marni er ikki við og hansara sess hevur Einar Hansen yvirtikið. Atli er við, men kemur væntandi at røkja uppgávuna sum sentralur miðvallarleikari, nú Súni Olsen er leikbannaður. Tískil kemur Johan Troest Davidsen at spæla høgri bakkur, nú hann er skaðafríur. Til miðverjuna hevur Jógvan Martin Olsen einki annað val, enn at brúka Jón Róa Jacobsen og Óla Hansen nú hvørki Óli Johannesen ella Fróði Benjaminsen eru við. Her vóru fýra tær fyrstu broytingarnar.

### Miðvøllurin broyttur

Á miðvøllinum eru eisini stór útskifting. Súni Olsen er sum sagt leikbannaður, og í hansara stað kemur Atli Danielsen – broyting nummar fimm. Hin sentrali miðvallarleikarin, Mikkjal Thomassen verður tó hin sami sum móti Ukraina seinast.

Jákup á Borg átti høgru síðu 24. mars, men er skaddur og tískil ikki við. Henda sess tók Hjalgrím Elttør sær móti Fraklandi, men við tað at Christian Høgni er leysur av høgra bakki, verður hann hann fluttur fram á vinstru síðu. Símun Samuelsen fer síðani yvir í hitt borði og Hjalgrím Elttør rýkur út.

Hetta merkir at bæði Símun Samuelsen og Christian Høgni Jacobsen, sum annars vóru við í móti Ukraina, báðir spæla á øðrum plássi enn tá. Tá var Christian Høgni í álopinum og Símun Samuelsen vinstri miðvallarleikari. Sætta og sjeynda broytingin.

Rógvi Jacobsen og Christian Lamhauge Holst vera fremstu menninir hesaferð. Rógvi var við móti Ukraina, men tá sat Christian Lamhauge Holst á beinkinum. Tað fer hann ikki hesaferð og tað er áttanda broytingin á liðnum í dag í mun til liðið, ið varð sent á vøllin móti Ukraina á Svangasskarði 24. mars.



**Liðið 24. mars 2007:**

**Jákup Mikkelsen – Atli Danielsen, Óli Johannesen, Fróði Benjaminsen, Marni Djurhuus – Jákup á Borg, Súni Olsen, Mikkjal Thomassen, Símun Samuelsen – Rógvi Jacoben, Christian Høgni Jacobsen.**

# Bergur, Hanus og Tem eru hot

Millum lokalu fjølmiðlafólkini í gjár vóru tvær kvinnur. Teir eygleiddu venjingina og skrivaðu smáar notitsir á teirra ljósareyðu blokkar. Ein sjáldsom sjón, tá fótbóltsdystir vanliga bara verða dekkaðir av monnum. Tær komu eisini yvir og spurdu, hvørjir leikararnir vóru við tølunum 7, 12 og 15 á venjingarbúnunum vóru? Hetta vóru Bergur Midjord og Hanus Thorleifsson hjá B36 og Tem Hansen úr Lyngby. Tað vísti seg síðani, at kvinnuligu journalistarnir arbeiddu fyri eitt damu-blað, sum ikki endiliga eygleiddi fótbóltsevnini á vøllinum. Í hvussu so er staðfestu tær báðar, at teir tríggir vóru hot.